


# Statoil umhvørvisgóðkenning til nýggja boring

**Jan Müller**

27.06.2014 - 17:36

Oljan.fo

## Umhvørvisstovan hevur hin 27. juni 2014 givið Statoil loyvi til nýtslu og burturbeining av kemikalium í sambandi við boring av leitibrunninum Súla-Stelkur.

Boringin byrjar um mánaðarskiftið juni-juli 2014. Boripallurin West Hercules verður nýttur til boringina.

Loyvið fevnir um nýtslu og burturbeining av kemikalium, sum verða brúkt í sambandi við boringina.

Í viðgerðini hevur Umhvørvisstovan lagt dent á, at tey loyvdu kemikaliini ikki eru seint

niðurbrótilig í náttúruni, ikki upphópast í livandi verum og ikki eru eitrandi. Í loyvinum eru harumframt settar treytir um botnkanningar nærhendis brunninum, bæði áðrenn og aftaná boringina, um umhvørvisstýring, viðgerð av burturkasti, o.a.

**Loyvið kann kærast**

Tey, ið hava kærurætt, kunnu kæra góðkenningina til Fiskimálaráðið. Kærurætt hava tey, sum avgerðin hevur ein týðandi persónligan týdning fyri.
Møgulig kæra skal sendast Umhvørvisstovuni, Traðagøta 38, FO-165 Argir, í seinasta lagi fríggjadagin 25. juli 2014 skrivar Umhvørvisstovan á síni heimasíðu.